# Trygvi á Pubbini

Fríggjakvøldið verður livandi tónleikur á Pubbini hjá Thomsen. Tað verður Trygvi Strøm, ið fer at spæla. Trygvi er garvaður guitarleikari og hevur eisini nomið sær útbúgving innan tónleik. Við sær á bassi og kór fríggjakvøldið hevur hann Dagfinn Olsen, og á skránni er kendir sangir frá fólka- og rocktónleikinum.



# Skálavík fyri samanlegging við Havnina

Lítil ivi tykist vera um at allir bygdarráðslimirnir í Skálavík eru samdir um, at best hevði verið fyri Sandoynna er at farið upp í Tórshavnar Kommunu sum skjótast, skrivar heimasíðan bkv.fo. Tað eru stórir fyrimunir fyri báðar partar og sera spennandi fyrimunir. Sum skilst er meiriluti í fólkinum í Sandoynni at fara upp í Tórshavnar Kommunu.

bankunum. Nú eru vit í gongd við at umskipa alla fíggjarvinnuna her á landi, og høvuðsuppgáva okkara er at fáa eitt fíggjarkerv upp at standa, ið virkar, og sum dekkar tann tørv, vit hava í Íslandi. Hetta er ikki nøkur løtt uppgáva at loysa, men eg kenni meg sannførdan um, at tá vit eru komin ígjøgnum hesa prosess, sær framtíðin bjørt út fyri Ísland, sigur Geir H. Haarde, forsætisráðharri.

Hann vísir á, at Ísland hevur stór náttúrugivin ríkidømi, sum til dømis fisk og nógvan hita og orku í undirgrundini. Landið er vakurt og lokkandi fyri ferðafólk, umframt at íslendingar eru væl útbúnir.

Tað er stór vreiði hjá íslendsku myndugleikunum og í fíggjarvinnuni um tað, sum bretska stjórnin gjørdi, tá Gordon Brown, forsætisráðharri, fekk eina antiyvirgangslóg samtykta, ið gav bretsku myndugleikunum møguleika til at yvirtaka ein íslendska dóttirbanka í Bretlandi. Hetta váttar Geir H. Haarde.

Nú kunnu vit ikki leggja alla skuldina fyri kreppuna yvir á bretar, men tað var ein sera óvinarlig atsókn móti okkum, sum bretski forsætisráðharrin tók stig til. Stjórnin yvirreagerði fullkomiliga við at gera hatta. Vit er ógvuliga óð um, at Gordon Brow nýtti eina antiyvirgangslóg fyri at taka bankan. Harafturat eru bretar komnir við sera negativum útsagnum móti Íslandi, og hetta eru vit rættiliga hørm um.

Fara tit íslendingar at koma við ein rættarligum eftirspæli mótvegis bretum?

Hetta vil eg ikki avvísa, er stutta svarið hjá íslendska forsætisráðharranum.

Arbeitt verður við at finna eina fíggjarliga skipan, ið skal loysa íslendsku búskaparkreppuna, og fleiri møguligar loysnir verða nevndar her: At fáa russar inn at fíggja, at søkja hjálp hjá norðurlendsku tjóðbankunum ella at fáa norska oljugrunnin at koma við eini saltvatnsspræning í íslendsku fíggjarvinnuna. Ein annar møguleiki, sum eisini verður nevndur, er at fáa teir sterku íslendsku pensjónsgrunnarnar at gera íløgur í bankarnar og harvið bjarga teimum. Hesum eru leiðslurnar í pensjónsgrunnunum fyribils ikki serliga heitar fyri.

Vit arbeiða við øllum møguleikum. Í løtuni samráðast vit við russar, men um tað kemur nakað ítøkiligt burtur úr hesum samráðingum, er ov tíðliga at siga nakað um enn, sigur Geir H. Haarde.





*Kjartan Ólafson er tinglimur fyri stóra samgonguflokkin, Sjálvstæðisflokkin*

ikki minst av Ögmundi Jónasson í Sosialinum í gjár, at kapitalisman hevur spælt fallit, men hesum er Kjartan Ólafson als ikki samdur í.

- Kapitalisman virkar. Nakað annað er, at hon eisini skal hava eitt regulsett, og tað er sannlíkt, at tað verður neyðugt at víðka hesar reglar, fyri at tryggja okkum móti slíkum, sum nú er hent, í framtíðini, sigur hann.

Hetta skal gerast frá botni av, og Kjartan Ólafson heldur, at tað fer ikki at ganga long tíð, til bankarnir aftur verða privatiseraðir.

- Men tað eru amboðini hjá fíggjareftirlitnum, sum vit fyrst og fremst mugu hyggja nærri at og fáa skipa um, sigur Kjartan Ólafson.

Hóast djúpu kreppuna, so væntar altingsmaðurin ikki, at veljarin fer at venda flokkinum bakið.

- Nei, tað rokni eg ikki við. Nú eru tað eisini trý ár til val verður, og eg vænti, at til ta tíð hevur Ísland reist seg aftur, so eg vænti ikki, at Sjálvstæðisflokkurin fer at líða undir tí, sigur Kjartan Ólafson.

Tað er kortini enn ov tíðliga at siga, hvussu leingi kreppan varar, men altingslimurin heldur, at tá onnur skuld enn hon hjá bankunum er niðurgoldin, so hevur íslendski landskassin so at siga onga skuld.

## Útlendskur valuta skal til

Íslendska stjórnin hevur eina avtalu við norðurlendsku tjóðbankarnar um útlendskan valuta, og Kjartan Ólafson sigur, at teir longu hava fingið pening frá norðurlendsku tjóðbankunum.

- Men við atliti til lán frá IMF ella russum, so er tað enn ov tíðliga at siga, til hvørjar treytir vit kunnu fáa hesi lánini. Hvørjar renturnar verða og hvør afturgjaldstíðin skal verða. Men vit hava eina sendinevnd í Russlandi í løtuni, sum samráðist um treytirnar fyri einum láni frá teimum, sigur Kjartan Ólafson.

Men hann undirstrikar, at enn er ov tíðliga at siga, hvørjum tað endar við, tí enn hava íslendarar ikki samráðst seg fram til nakra loysn.

- Tað kann gerast IMF og tað kann gerast Rusland. Ella tað kann gerast ein samansjóðing av báðum. Tað er bara ov tíðliga at siga nakað um tað, tí vit kenna ikki treytirnar enn, sigur Kjartan Ólafson sum vónar, at tað finst ein breið loysn, so váðarnir kunnu spjaðast.



*Henrik Old førir í hesum døgum Rasmus Effersøe, sum er eitt sonevnt Guard Vessel*

*Mynd: Leo Poulsen*

# Liggja á Reykjavík við maskinbreki

**Rasmus Effersøe, sum í løtuni hevur Henrik Old sum skipara, liggur í løtuni á Reykjavík við maskinbreki**

**Reykjavík:** Kent fólk er allastaðni.

Mitt meðan eg standi í bíðirøð inni í Landsbankinn at sleppa fram at at veksla nakrar krónur, renni eg meg inn í Óla Breckmann. Hann var bara komin válandi inn á veg oman á keiina, tí hann ætlaði sær umborð á Rasmus Effersøe at heilsa upp á gamla tingvinin, Henrik Old.

So vit gjørdu ferðalag umborð, har Oldurin bjóðaði bæði kaffi og frukt.

Hann greiddi frá, at teir vóru komnir inn við maskinbreki seinasta sunnudag. Tað var ein blásari til motorin, sum var gingin fyri. Menn frá MEST vóru komnir upp til Íslands at umvæla brekið, men seinasti eykaluturin kemur neyvan fyrr enn leygardagin, so Rasmus Effersøe og manningin má brynja seg við toli.

Teir sigla heilt uppi við Grønland sum ansingarskip.

- Okkara uppgáva er at sigla framman fyri skipinum, sum skjýtur seismikk og syrgja fyri, at skip ikki liggja í vegin. Í hesum førinum er tað eyðvitað ikki skip, men ísi, vit mugu ansa eftir, sigur Henrik Old.

## Í góðari tíð

Sum nevnt er tað seliga í sambandi við skipaferðslu, at tað er neyðugt hjá seismikk skipunum at hava ávaringarskip framman fyri seg. Tí tað er ikki bara sum at siga tað, at snara einum seismikkskipi.

Nei, har ber ikki til at snara róðrið í borðið. Teir hava ein seks kilometrar langan kápil aftur úr sær, og tað gongur rúm tíð frá tí at vit boða frá, at neyðugt er at snara, til seismikkskipið veruliga byrjar at snara, sigur Henrik Old.

Tí er neyðugt hjá ansingarskipinum at siga frá í góðari tíð, áðrenn seismikkskipið hevur møguleika at snara.

Vit sigla gjarna einar seks til níggju fjórðingar framman fyri seismikkskipið, fyri at kunna siga frá í góðari tíð, um nakað er galið, sigur Henrik Old.

Annars hoyrdist í síðstu viku, at Rasmus Effersøe skuldi vera komin í eitt rættiligt burturgangingar veður, og at einki skuldi havt verið at hoyrt frá skipinum í fleiri dagar, men tað kennir Henrik Old – og manningin annars, sum var í mesuni, tá vit vitjaðu – als einki til.

Tað var eitt sindur tvassut, men hann lá beint inn aftaná, so har var einki at tosa um, sigur Henrik Old.

Men teir mugu altso liggja inni í Reykjavík til í minsta lagi fram til leygarkvøldið.